**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)

# Úttøkuskipan til HMS 2025 í Singapore

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi úttøkuskipan til HeimsMeistarastevnuna á langgeil 2025, sum verður í Singapore frá 27. juli til 3. august 2025.

Sjálvar kravtíðirnar til einstaklingakappingar eru sum ásettar av World Aquatics, sí https://www.worldaquatics.com/competitions/4725/world-aquatics-championships-singapore-2025

Tað vil siga við A og B kravtíðum, har B-kravtíðin kann nýtast um einans ein luttakari er í viðkomandi kappingargrein, og A-kravtíðin ífall at tveir luttakarar av sama kyni vilja luttaka í somu grein. Gevið gætur at hesar skulu klárast á serliga AQUA-góðkendum stevnum, sí lista umvegis leinkið omanfyri.

Reglur AQUA loyva hartil at vit kunnu taka út eyka svimjarar, upp til og við at hópurin er tilsamans tvær (2) kvinnur og tveir (2) menn. Hesir eyka svimjarar kunnu tá í mesta lagi luttaka í tveimum (2) greinum, og væl at merkja ikki í somu grein sum nakar annar av okkara.

Um trupulleiki er við ov nógvum svimjarum til somu grein, so verður skjótasti svimjari úttikin.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar til liðsvimjing.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2025.

Úttøka av juniorum kann upp á tal, serliga um færri enn tveir seniorar av hvørjum kyni klára kravtíð. Gevið tó gætur, at AQUA hevur ásett minstaaldur á 14 ár fyri luttakarar á sínum meistarastevnum.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 1. sep. 2024 til og við 26. apríl 2025 (til og við Tórshavn Open 2025)

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða SSF um teir svimjarar sum í kravtíðarskeiðnum hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum, og fyri miskiljingum í mun til treytirnar frá AQUA.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS

**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)

# Kravtíðir til HM 2025 í Singapore

At klára á langgeilaastevnum góðkendar av AQUA sum úttøkustevnur til HM 2025

| Kravtíðir - Kvinnur | | | Kravtíðir - Menn | |
|---|---|---|---|---|
| **B - 1 svimjari** | **A - 2 svimjarar** | | **A - 2 svimjarar** | **B - 1 svimjari** |
| 0:25.73 | 0:24.86 | **50 frí** | 0:22.05 | 0:22.82 |
| 0:56.15 | 0:54.25 | **100 frí** | 0:48.34 | 0:50.03 |
| 2:02.37 | 1:58.23 | **200 frí** | 1:46.70 | 1:50.43 |
| 4:18.99 | 4:10.23 | **400 frí** | 3:48.15 | 3:56.14 |
| 8:52.63 | 8:34.62 | **800 frí** | 7:48.66 | 8:05.06 |
| 16:59.02 | 16:24.56 | **1500 frí** | 15:01.89 | 15:33.46 |
| 0:29.21 | 0:28.22 | **50 rygg** | 0:25.11 | 0:25.99 |
| 1:02.58 | 1:00.46 | **100 rygg** | 0:53.94 | 0:55.83 |
| 2:15.67 | 2:11.08 | **200 rygg** | 1:58.07 | 2:02.20 |
| 0:31.83 | 0:30.75 | **50 bringa** | 0:27.33 | 0:28.29 |
| 1:09.21 | 1:06.87 | **100 bringa** | 0:59.75 | 1:01.84 |
| 2:31.02 | 2:25.91 | **200 bringa** | 2:10.32 | 2:14.88 |
| 0:27.15 | 0:26.23 | **50 firvald** | 0:23.36 | 0:24.18 |
| 1:00.37 | 0:58.33 | **100 firvald** | 0:51.77 | 0:53.58 |
| 2:13.73 | 2:09.21 | **200 firvald** | 1:56.51 | 2:00.59 |
| 2:17.48 | 2:12.83 | **200 blandað** | 1:59.05 | 2:03.22 |
| 4:52.97 | 4:43.06 | **400 blandað** | 4:17.48 | 4:26.49 |

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum, og fyri miskiljingum í mun til treytirnar frá AQUA

ATLANTIC AIRWAYS